## Rógvikapping í Runavík

**Leygardagin 8. apríl skipar Kapp-róðrarfelagið NSÍ á øðrum sinni fyri opnari kapping í innandura rógving**

RÓGVING
*Tíðindaskriv*

Kappingin er nevnd Fish Fair Kappingin eftir høvuðsstuðlinum North Atlantic Fish Fair. Øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka. Tað er ókeypis at luttaka í rógvikappingini.

Kappingin er bæði fyri einstaklingar og bólkar. Einstaklingakappingin er býtt upp í aldursbólkar, meðan stafettróðurin er kapping millum manningar í ymsu bátastøddunum. Tað serstaka við hesi kappingini er, at allir rógvararnir verða vigaðir kappingardagin. Allar tíðir verða síðani faldaðar við "vektjusterings-faktorinum". Hetta skuldi givið eina javna kapping, við tað at tey løttu og tey tungu í princippinum verða javnsett. Sí annars luttøkutreytirnar.

Allar kappingarnar fara fram á Concept 2 rógvimaskinum, ið líkjast teimum, ið eru at finna í kapproðrarfeløgunum kring landið. Kappingin verður hildin í Ítróttarhøllini í Runavík. Tilmelding fer fram umvegis heimasíðuna www.kappnsi.info innan hóskvøldið 6. apríl kl. 24.00.

Eini 100 fólk tóku lut í kappingini í fjør. Kapp-róðrarfelagið NSÍ vónar, at luttøkan verður eins góð í ár.

## Framsýningar hjá Støkk



*Genturnar hjá Støkk hava just verið í Estlandi og kappast á altjóða støði; tær vera at síggja á framsýningini sunnudagin.*

TÍÐINDASKRIV
*Fimleikafelagið Støkk*

Árligu framsýningarnar hjá Fimleikafelagnum Støkk vera komandi vikuskifti í ítróttarhøllini í Runavík. Á skránni eru umframt vanligu liðini hjá Støkk, eisini fimm úrvalslið, sum øll hava ella fara at kappast í estetiskum fimleiki. Harumframt verður amboðsfimleikur á høgum støði at síggja. Fimleikararnir hava vant allan vetur, og eru tí sera spentir at sleppa at vísa síni kynstur fram.

Fimleikafelagið Støkk er í støðugum vøkstri, og tí hevur felagið avgjørt at hava tvær ymiskar framsýningar í ár. Hin fyrra verður leygardagin 1. apríl kl. 17:00, og tá fara yngru liðini at framføra. Seinna framsýningin við eldru liðunum verður sunnudagin 2. apríl kl. 17:00.

Meðan framsýningarnar eru, verður stórt páskatombola í gongini, har ymiskt páskaprýði og páskaregg vera at vinna. Møguleiki verður eisini at keypa sær ein kaffimunn og okkurt gott afturvið.

Fimleikararnir gleða seg til framsýningarnar, og øll í Støkk vóna at síggja bæði systkin, foreldur, ommur og abbar, vinir og kenningar, og øll onnur fimleikaáhugað í ítróttarhøllini í Runavík 1. og 2. apríl.

# Jan Herman verður róðrarformaður

**Komandi leygardag verður aðalfundur í Róðrarsambandi Føroya, og tá verður Jan Herman Hansen valdur til nýggjan formann í sambandinum**

KAPPRÓÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sitandi formaður, Johannes Joensen, ið hevur sitið í róðrarsambandinum í drúgva tíð, tekur ikki við afturvali, og bert eitt valevni er til formanssessin, nevnliga Jan Herman Hansen. Komandi formaðurin hevur sitið í nevndini í Róðrarsambandi Føroya í nøkur ár, og tí hevur hann eisini fitt av kunnleika um, hvussu nevndararbeiðið í Róðrarsamband Føroya virkar.



*Jan Herman Hansen verður leygardagin valdur til nýggjan formann í Róðrarsambandi Føroya.*

*Mynd: www.drekin.fo*

### Lógarbroytingar á skránni

Umframt formansvalið eru eisini onnur mál á skránni á aðalfundinum komandi leygardag. Róðrarsambandið hevur skotið upp, at tá ið børn rógva, skulu einans 500 metrar rógvast í mun til teir 1.000 metrarnar, ið tað hevur verið róð higartil.

Eitt annað lógaruppskot, ið verður lagt fyri aðalfundin, er, at Róðrarsambandið vil broyta raðfylgjuna, ið róð verður. Hetta hevur verið sera nógv umtalað í fjør, bæði í fjølmiðlum og róðrarheimasíðum, tí at ávísir bátar hjá 5-mannaførum og 6-mannaførum ikki fingu tíð til neyðugu upphitingina.

# Svumu í 24 tímar uttan steðg

**Síðsta vikuskiftið var árliga stuðuls-svimjingin í Fugla-firði. Børn og vaksin svumu slakar 100 kilometrar hetta døgnið**

SVIMJING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fuglafjarðar Svimjifelag hevði um vikuskiftið sína árligu stuðlssvimjing, har svimjarar í felagnum og onnur svimja í 24 tímar út í eitt

Byrjað varð fríggjadagin kl.15.00, og tann síðsti svimjarin kom á mál kl. 15.00 leygardagin. Teir flestu av svimjarunum í felagnum vóru við, og harafturat fingu tey eisini hjálp frá eldri svimjarum og foreldrum.

Tað vóru tey smæstu, sum byrjaðu fríggjadagin, og tey svumu í ein hálvan tíma. Hvør svimjari svam eina longd í senn.



*Svimjarar í øllum aldri tóku tøk í stuðulssvimjingini í Fuglafirði um vikuskiftið*

Tá tey smáu vóru liðug, byrjaðu fyrsta og annað lið, tey vóru 24 í tali. Tey vóru trý í hvørjum bólki, og svam hvør bólkur í ein hálvan tíma hvørja ferð, tó var bert ein svimjari í hylinum í senn. Hesi bæði liðini hildu so tørn alla náttina.

### Hjálp frá gomlum svimjarum

– Fyri at tað ikki skuldi blíva ov strævið hjá teimum, fingu tey fríggjakvøldið hjálp frá nøkrum gomlum svimjarum hjá felagnum – millum annað Pól Øregaard, Astrid Joensen, Heðin Olsen og sjálvandi venjararnir báðir Petur Heðin á Fløtti og Sonni Eliasen. skrivar Fuglafjarðar Svimjifelag í tíðindaskrivi.

– Eisini vóru fleiri foreldur, sum hjálpti at svimja – Annika Egholm, Durita Eldevig, Andrea Eldevig, Maria Hansen, og Magni Joensen. Leygarmorgunin fingu vit so hjálp frá seniorunum hjá okkum. Tað eru eldri menn, sum svimja hvønn leygarmorgun. Teir vóru beinanvegin til dystin fúsir, og takka vit eisini fyri teirra íkast.

Svimjifelagið hevði lænt tvær skúlastovur, so svimjararnir kundi hvíla seg, tá ið teir ikki svumu. Hóast tað gekk væl at fáa svimjararnar upp um náttina at svimja, so kom tað fyri at onkur pápi mátti leypa í hylin, tí svimjarin var ov linur.

– Felagið hevði sett sær sum mál, at svimja 100 km., men tá av tornaði var endaliga úrslitið 98.7 km. Hetta eru vit væl nøgd við, men næsta ár hava vit sett okkum tað treytaleysa mál, at koma upp um 100 km. Vit vilja nýta høvi til at takka øllum sum stuðlaðu okkum, siga tey úr Fuglafjarðar Svimjifelag.

# FSF kannar fótbóltsvøllirnar

**Umboð fyri Fótbóltssambandið fara í næsta mánaði at kanna allar fótbóltsvøllir kring landið. Endamálið við kanningini er, at fáa staðfest hvørjum standi vøllirnir eru í**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fótbóltssamband Føroya fer í apríl mánaði at kanna allar fótbóltsvøllir í Føroyum, og eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, fáa feløgini boð um at fáa tey upp á pláss.

Tað, sum FSF ætlar sær at kanna, er: mát av vølli, uppmerking, bandar, mál og málnet, hornafløgg, útskiftingarbonkur og tekniskt øki, børa, máltalva, sjálvur vøllurin, skiftirúm, umstøður kring vøllin og annað

– Endamálið við kanningini er, at fáa staðfest hvørjum standi vallirnir eru í. Út frá hesari kanning, ger kappingarnevndin eina meting av støðuni, og síðani verður tað fráboðað feløgunum, hvørjar møguligar broytingar eru neyðugar, sigur FSF í eini fráboðan til feløgini.

FSF setir seg í samband við feløgini í næstum, fyri at gera nærri avtalu um júst nær vit koma á vitjan.